VIÐMERKINGAR

# Føroyska røddin á Fólkatingi

**Malan Johansen**
*Sjálvstýrisflokkurin*

Sum limur í Fólkatinginum er tað fremsta uppgávan at vera eygu og oyru hjá føroyingum á Fólkatingi. Fólkatingsumboðini eru eitt slag av umboðsmonnum fyri Føroyar, og skulu lurta og fylgja við gongdini í Danmark, so føroyingar eru til reiðar at taka støðu, tá tað krevst. Best er, um føroyingar eru frammanfyri gongdina og kunnu ávirka hana til fyrimunar fyri Føroyar.

Uppgávan hjá føroysku fólkatingsumboðnum er eisini at vera bindilið millum Føroya og Danmark. At kunna danir um føroysk viðurskifti. Tað er týdningarmikið at danir hava góða vitan um føroysk viðurskifti. Eg eri vís í, at kendu danir betri til føroysk viðurskifti tá kreppan kom, hevði forstáilsi hjá teimum verið betri og so hevði samskifti eisini verið betri. Men bindilið gongur eisini hinvegin. Føroysku fólkatingsumboðið skulu kunna løgtingið og landsstýrið um, hvat fyriferst á Christiansborg bæði í fólkatingssalinum og í fólkatingsnevndunum. Tað krevur at fólkatingsumboðini eru fulla tíð á Christiansborg - og tað lovi eg, um eg verði vald.

Eg trúgvi uppá sjálvstýrið og vil at arbeiða fyri tí. Tað merkir, at í longdini eiga fólkatingssessirnir hjá føroyingum at vera niðurlagdir.

Hinvegin - so leingi skipanin er sum hon er, eiga fólkatingsumboðini at gera tað, tey kunnu fyri at verja, betra, tryggja og umboða føroysk áhugamál.


VAL05

# Eitt gott og fjølbroytt heilsuverk

**Sambandsflokkurin er tann einasti flokkurin, ið vil varðveita ríkiseindina, og er harvið flokkurin sum best kann tryggja føroyingum fullan rætt til neyðuga viðgerð á sjúkrahúsi.**

**Alfred Olsen**
*tykkara valevni á Sambandslistanum*


VAL05

Sambandsflokkurin er besta trygdin fyri, at tey, sum blíva rakt av sjúku ella koma til skaða, kunnu koma undir læknahond og fáa neyðuga serviðgerð á sjúkrahúsunum bæði her heima og í Danmark, tá tað er neyðugt.

At tryggja okkara sjúku og heilsuveiku eina skjóta og góða viðgerð er ábyrgdin hjá vælferðarsamfelagnum Føroyum. Tí virkar Sambandsflokkurin fyri eini menning av heilsuverkinum her heima, samstundis sum vit tryggja teimum sjúku og heilsuveiku neyðuga serviðgerð uttanlands.

Hjá tykkum, sum eru sjúk ella eru avvarðandi av sjúkum fólkum, er trygt at vita, at tað er ein flokkur í Føroyum, sum vil tryggja tykkum atgongd til eitt fjøltáttað heilsuverk, sum er millum tey bestu í heiminum.

Vel tí Sambandsflokkin og harvið trygdina fyri einum heilsuverki, ið er millum tey bestu í heim-inum.

# Fólkatingssessurin er eitt fulltíðarstarv

**Helena Dam á Neystabø**
*Javnaðarflokkurin*


VAL05

Tá ið tú til fólkatingsvalið tann 8. februar fert at velja tína rødd út í heim, so hevur tað týdning, at tú hugsar um, hvørt røddin yvirhøvur verður at hoyra í Fólkatinginum, og um títt fólkatingsumboð fer at arbeiða fyri Føroyar út í heimi.

Allir teir føroysku fólkatingslimirnir hava í nógv ár verið fulltíðarpolitikarar í Føroyum eisini. Tí hava Føroyar fingið ov lítið burtur úr hesari uttanlandssumboðan. Fólkatingið og Løgtingið arbeiða sum kunnugt samstundis. Eingin kann røkja tveir tingmannasessir í senn í hvør sínum landi. Bæði sambandskvinnan og tjóðveldismaðurin á Fólkatingi hava hesi seinastu fýra árini verið bæði løgtingsmenn og fólkatingsmenn.

Tann føroyski fólkatingslimurin fær góða løn og góðar umstøður - tað forpliktar! Hvat høvdu føroyingar sagt, um vit rindaðu fulla løn og eftirløn til tveir danir í Løgtinginum, og at teir ongantíð vóru at hitta.

Tí hevur tað týdning, at tú velur ein flokk, sum vil taka fólkatingsarbeiðið í álvara, og at tú velur eitt fólk, ið vil arbeiða í Fókatinginum burturav, og sum dagliga og áhaldandi vil arbeiða fyri at styrkja støðu Føroya á altjóða leikpallinum.

Vegna Javnaðarflokkin bjóði eg meg fram til at taka hesa uppgávu uppá meg - At røkja fólkatingssessin sum eitt fulltíðarstarv.

## Gjald fyri valgreinar

Eins og tað hevur verið vanligt í tíðini fram til eitt val, fer Sosialurin aftur hesa ferð at taka gjald fyri valgreinar, sum verða settar í blaðið, hetta fram til fólkatingsvalið.

Gjaldið fyri valgreinar er helvtin av vanligum lýsingarprísi.

**Sosialurin**

# FØROYAR.FO – FØROYAR.COM

**tórbjørn jacoben**


VAL05

Verðin er lítil, og hon verður minni. Einu flogferðina úr Keypmannahavn til Keflavíkar sat eg í sama raði sum tveir kendir íslendingar. Fyrrverandi forsetin Vígdis hevði verið og tjekkað hvussu gekst við Norðurbryggjuni og Haldór Asgrimsson hevði verið í Portugál og samrátt við Europeiska Samveldið um eitthvørt.

Tveir grønlendskir og ein føroyskur tingmaður úr danska parlamentinum sótu har, ávegis at vitja Altingið, í eini roynd at skilja, hvussu menn høvdu skipað ein sjálvstøðugan stat í norðurhøvum. Eina republikk. So ymiskt er politiska flogið um okkara leiðir.

Sum er, hava føroyingar ongan politiskan legitimitet uttan fyri føroyskt øki. Danir hava sett seg á hendan rættin og okkara laissez-faire hugburður hevur latið standa til. Staðfestingin hjá Jóannesi Bóndi, um vit sjálvi verða stolin, vit eru líka tolin, er eins sonn ídag, sum táið hon varð snikkað til.

Nú røkist fyri, at danir fara at leggja seg undir ES-grundlógina. Tá skelvir í politiska grundvøllinum landanna millum. Uttanríkispolitisku heimildirnar hjá føroyingum, sum hava ligið í Keypmannahavn, verða tá fluttar til Brússel.

Politisku heimildirnar mótvegis umheiminum fara tá at liggja hjá okkara størsta handils-partnara og okkara mótstøðuparti í týðandi samráðingum um rættindi av alskins slagi. Hetta hevði ongin onnur tjóð kunna liva við.

Sambandsflokkurin ynskir alt vald til Brússel. Javnaðarflokkurin situr og fiflar við einum uppskoti, sum skal áseta hvussu stórir ella smáir uttanríkispolitisku molarnir skula vera, ið fara at fella av húsbóndans borði. Og Fólkaflokkurin ætlar at seta ein landsstýrismann í uttanríkismálum við ongum heimildum. Eitt tómt hugskot, ið ætlast at nøkta fáfongdina hjá onkrum teirra.

Upp í móti hesum stendur Tjóðveldisflokkurin. Hann ætlar at skipa eitt Uttanríkisráð við óskerdum heimildum í einum føroyskum stati. Endamálið er greitt. Javnbjóðis skipað viðurskifti við umheimin fara at tryggja, at Føroyar framhaldandi vera ein sjálvstøðug demokratisk tjóð, vara verður av politiskum, handilsligum, búskaparligum og mentanarligum áhugamálum og vit fara at geva okkara íkast til menningina av einum demokratiskt skipaðum heimi.

Pr. formalia eru tveir sessir í danska nationala parlamentinum einastu politisku sessir vit eiga uttanvert landoddarnar. 2 av 179. Soleingi hesin ússaligi tilstandur er ein veruleiki, fer Tjóðveldisflokkurin at brúka annan ella báðar, at fremja føroysku søkina, at berjast fyri at allar politiskar heimildir vera vunnar føroyingum aftur. Vinnast má á hesum paradoksinum, at mótstøðumenn okkara í handli og áhugamálum vara av og umsita okkara viðurskifti við allan heimin.

Ymiskt er hvussu nógv verður lagt í hetta. Her verður ein samgonga skipað fyri og onnur eftir. Og alt snýr seg bara um hvussu vit frægast megna at barbera hvør øðrum. Táið Haldór Asgrimsson fer úr uttanríkisráðnum í forsætismálaráðið fer David Oddsson hinvegin, so týðandi verður sessurin hildin at vera hjá grannunum vestanfyri. Størsti spenningurin í USA eftir forsetavalið var, hvør oddvitin fór at vera í uttanríkismálaráðnum. Condoliza Rice. Hví umboðar ein kvinna ikki føroysk politisk áhugamál á altjóðapallinum, heldur enn danir og um skamma stund kontinentalkapitalurin og teirra politisku áhugamál í Brússel.

Haldór er vorðin evsti politiski oddviti í Íslandi síðani flogferðina. Hjálandastøðan hjá Grønlandi og Føroyum er óbroytt. Tí er tað av avgerandi týdningi, at Norðuratlantsbólkurin á Fólkatingi ótarnaður kann halda fram við sínum góða starvi eftir valið týsdagin.